# Talgildur samleiki

## Undirskjal 3 – Lóggáva

APRIL 2016

TALGILDU FØROYAR

# Undirskjal 3 – Lóggáva


Lóggáva viðvíkjandi Talgildum Samleika, undirskrift og innsigli ..... 3

Talgildur samleiki ..... 3

Talgilding av almennu umsitingini ..... 3

Álitistænastur ..... 4

- Elektronisk undirskrift ..... 4
- Krøv sambært ES-forordningini nr. 910/2014 ..... 5
- Innsigli. ..... 5

Ábyrgdarreglur ..... 5

- Lóg um elektroniska undirskrift ..... 5
- Nýggja EU-forordningin ..... 6

Onnur galdandi lóggáva ..... 6

- Persónsupplýsingarlógin. ..... 6
- Revsilógin. ..... 7
- Breksáttmálin. ..... 7

Fylgibroyting í aðrari lóggávu vegna formkrav í lóg ella kunngerð um skriftligheit ..... 7

Lýsing av høvuðstættunum í viðkomandi lóggávu. ..... 8

- Løgtingslóg nr. 74 frá 25. februar 2009 um elektroniska undirskrift. ..... 8
- Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum ..... 8
- Lóg um fólkayvirlit ..... 9
- Lóg um alment innlit ..... 10
- Fyrisitingarlóg ..... 10
- Revsilógin ..... 11
- Breksáttmálin ..... 11
- Nýggj løgtingslóg um elektroniskan samleika og álitistænastur o.a. ..... 11

# Lóggáva viðvíkjandi Talgildum Samleika, undirskrift og innsigli

## Talgildur samleiki

Í Føroyum er p-talið tað nærmasta vit koma til eitt alment útgivið samleikaprógv við tað at øll, sum verða fødd ella flyta til Føroya, fáa eitt p-tal. Upprunin til p-talið var eitt ynski um at hava eintýdda eyðmerking av persónum í mun til skattseting, tá ið skift varð til eina nýggja elektroniska samtíðarskattaskipan í Føroyum. Seinni bleiv vanligt at brúka p-talið sum eyðmerking í almennu fyrisitingini.

P-talið verður ikki mett sum eitt trygt samleikaprógv, serliga tí ongin mynd er á prógvnum.

Í so máta er koyrikort og pass betri egnað sum samleikaprógv, men hetta kann einans brúkast av teimum, sum hava fingið koyrikort ella pass, og er tí ikki nakað, sum allir borgarar í Føroyum kunnu brúka.

Nú ætlanin er at fáa ein talgildan samleika ella eID, kann tað staðfestast, at tað ikki er nøkur lóggávu galdandi í Føroyum, sum beinleiðis regulerar slíkt. Tó er lóggáva, sum ein talgildur samleiki má vera í tráð við, serliga persónsupplýsingarlógina, men eisini fyrisitingarlóg, innlitslóg, fólkayvirlitslóg kunnu verða viðkomandi alt eftir, um ætlanin er, at øll í Føroyum skulu hava ein eID, ella bert tey, sum ynskja tað, tvs. eftir umsókn.

Ætlanin er at ein føroyskur talgildur samleiki eisini skal kunnu brúkast uttanlands. Tí er tað sera viðkomandi, at ES júst hevur samtykt eina nýggjan forordning um elektroniska samleika og álitistænastur, sum kemur í gildi 1. juli 2016. Endamálið við forordningi er m.a. at hava eitt sambæriligt trygdarstøði fyri talgildan samleika og álitistænastur, sum kann styrkja álitið til elektroniskar flytingar og skipanir. Eisini verður lagt upp til at limalond góðkenna talgilda samleikar hjá hvørjum øðrum. Sambært forordningini eru tað trý trygdarstøði fyri talgildum samleika. Lágt, munandi ella høgt.

Mælt verður tí til at gera eina nýggja *løgtingslóg um talgildan samleika og álitistænastur*, sum implementerar ES-forordningin í føroyska lóggáva. Við hesum fáa vit ein samleika, sum er sambæriligur við samleikar í ES-londum, umframt Noreg og Ísland, umframt at tað hjá okkum eisini verður lættari at góðkenna samleikar úr øðrum londum.

Meginreglurnar í persónsupplýsingarlógini um at tað ikki mugu innsavnast meira upplýsingar enn tað, sum eru neyðugt fyri at røkka endamálinum, er týdningarmikið at hava í huga, umframt at innsavnaðar upplýsingar ikki mugu brúkast til annað endamál og at víðarigeving krevur samtykki frá tí skrásetta.

Elektroniski samleikin í sær sjálvum krevur væntandi ikki serligar fylgibroytingar í øðrum lógum, tí hetta verður ein tryggur máti at eyðmerkja ein persón ella fyritøku.

## Talgilding av almennu umsitingini

Í fyrstu syftu er ikki ætlanin, at øll málsviðgerð og alt samskifti annars við borgaran skal talgildast. Men talgildur samleiki og talgild undirskrift beinir vegin fyri, at hetta fer at kunnu lata seg gera seinni.

Tá farið verður undir talgilding av sjálvari málsviðgerðini hjá almennum myndugleikum, er tað serstakliga týdningarmikið at hava treytirnar fyri almennari fyrisiting í huga og at gera og laga talgildar skipanir, soleiðis at hesar lúka treytirnar í t.d. fyrisitingarlóg, lóg um alment innlit og presónsupplýsingarlógini.

Danski umboðsmaðurin hevur í januar 2016 skrivað eitt upprit um ymiskar trupulleikar, sum hann hevur sæð í donsku fyrisitinginin í sambandi við at farið verður yvir til talgilda viðgerð í staðin fyri pappírsviðgerð.

Tað, sum umboðsmaðurin vísir á í uppritinum, er eisini viðkomandi fyri okkum.

Hann kemur inn á hesi evni:

- Autentisk avrit og varðveiting av hesum,
- Autenticitetskrøv til skjøl, sum verða send elektroniskt,
- Leitimøguleikar og skrásetingar í KT-skipanum,
- Underskrift, dagfesting, sendaraheiti, avgreiðsla og sending av skrivum,
- Partsumboðan,
- Fráboðan av avgerðum, skyldbundnar talgildar áheitanir frá borgara til myndugleika, leiðbeining,
- Rætturin hjá einum borgara at samskifta talgilt við tað almenna,
- Menning av nýggjum KT-skipanum hjá myndugleikum.

## Álitistænastur

Ein talgildur samleiki er fyrsti liður fyri at kunna brúka eina elektroniska undirskrift ella eitt innsigli. Elektronisk undirskrift er tá persónar ella einstaklingar undirskriva, meðan innsigli er tá virkir ella løgfrøðiligir persónar undirskriva.

### Elektronisk undirskrift

Í Føroyum er galdandi løgtingslóg nr. 74 frá 25. februar 2009 um elektroniska undirskrift, hvørs endamál er at fremja og tryggja virknað nýtslu av elektroniskum samskifti.

Sambært lógini er ein framkomin elektronisk undirskrift ein undirskrift sum: 1) eintýðugt knýtt at tí , sum skrivar undir, 2) ger tað møguligt at eyðmerkja tann, sum skrivar undir, 3) er gjørd við miðlum, sum einans tann, sum skriva undir, hevur ræði á, og 4) er knýtt at teimum dátum, undirskriftin viðvíkur, á slíkan hátt, at ein og hvør seinni broyting av hesum dátum kann verða avdúkað.

Ein framkomin elektronisk undirskrift verður sambært lógini javnsett við eina hondskrivaða undirskrift.

Hetta eru í dag galdandi krøv til eina elektroniska undirskrift. Elektronisk undirskrift kann einans brúkast av persónum og ikki virkjum ella løgfrøðiligum persónum.

Krøvini til elektroniska undirskrift eru tey somu, sum nú verða ásett í nýggju ES-forordningini um um elektroniska samleika og álitistænastur, sum kemur í gildi 1. juli 2016.

Løgtingslógin um elektroniska undirskrift vísir til direktiv 1999/93/EF um felagskapsrammu fyri elektroniskar. Hetta direktivið fer úr gildi 1. juli 2016, tá nýggja ES-forordningin nr. 910/2014 kemur í gildi, sum eisini fevnir um reglur um elektroniska undirskrift umframt aðrar álitistænastur.

Mælt verður tí til at løgtingslógin um elektroniska undirskrift verður sett úr gildi, samstundis sum ein nýggj løgtingslóg um elektroniska samleika og álitistænastur kemur í gildi.

### Krøv sambært ES-forordningini nr. 910/2014

Endamálið við forordningini er at tryggja ein vælvirkandi innara marknað í ES m.a. við at hava eitt sambæriligt trygdarstøði fyri talgildan samleika og álitistænastur, sum kann styrkja álitið til elektroniskar flytingar og skipanir.

Trygdarstigini fyri talgildar samleikar eru trý: Lágt, munandi ella høgt/framkomið.

Í art. 14 er ásett at útbjóðarar av álitistænastum, sum eru heimahoyrandi í triðjalandi, kunnu góðkennast sum javnsett sambært avtalu, sum skal gerast millum EU og viðkomandi triðjaland. Føroyar eru at rokna sum triðjaland í mun til EU. Tað er tí neyðugt at gera avtalu við EU um at góðkenna álitistænastur hjá føroyskum útbjóðarum.

Tað er ein treyt fyri, at ES kann gera eina tílíka avtalu við Føroyar, at føroyskir tænastuveitarir og tær álitistænastur, teir bjóða, lúka krøvini, sum í forordningini eru sett til framkomnar tænastuveitarir og framkomnar álitistænastur.

Ein føroyskur talgildur samleiki og talgild undirskrift, sum skal kunna brúkast í ES londunum, skal hava eitt trygdarstig, sum er høgt/framkomið, tvs, tað hægsta.

### Innsigli.

Eitt innsigli er ein elektronisk undirskrift hjá einum virki ella løgfrøðiligum persóni. Sambært forordningini er eitt *elektroniskt innsigli*: Dátur í elektroniskum sniði, ið fylgja, ella eru logiskt samanbundnar við øðrum elektroniskum dátum, og sum verða nýttar til at staðfesta, at hesar seinast nevndu dátur stava frá tí løgfrøðiliga persóni, sum er tilskilaður sum undirskrivari. Ein *innsiglaður partur* er ein løgfrøðiligur persónur, sum ger eitt elektroniskt innsigli.

Eins og við talgilda samleikanum kann tað staðfestast, at tað eru ongar reglur um elektroniska undirskrift hjá løgfrøðiligum persónum. Men við nýggjari *løgtingslóg um talgildan samleika og álitistænastum*, sum implementerar ES-forordningin í føroyska lóggávu, verða ásettar reglur um hetta. Krøvini eru tey somu sum til elektroniska undirskrift, men innsiglandi parturin er ein løgfrøðiligur persónur, sum skal hava eitt v-tal í staðin fyri p-tal.

## Ábyrgdarreglur

### Lóg um elektroniska undirskrift

Í Løgtingslóg nr. 74 frá 25. mai 2009, sum er í samsvari við EU-direktiv 1999/93/EF um elektroniska undirskrift, verða ábyrgdarreglurnar ásettar í Kapittul 5, §12.

Serligar ábyrgdarreglur eru fyri lyklamiðstøðir, sum geva út skikkað prógv til almenningin, ella sum yvir fyri myndugleikum taka ábyrgd av tílíkum prógvum, sum eru útgivin av eini aðrari lyklamiðstøð.

Lyklamiðstøðirnar hava ábyrgd fyri fíggjarligum missi hjá tí, sum hevur rímiliga orsøk til at líta á prógvið, og verður fyri fíggjarligum missi:

- orsakað av at prógvið ikki inniheldur rættar upplýsingar ella ikki inniheldur kravdu upplýsingarnar,
- sum stends av einum feili,
- sum stendst av at eitt prógv ikki er stongt,

- sum stendst av skeivum ella vantandi upplýsingum um lokadag ella galdandi nýtsluavmarkingar í einum prógvi, og
- av feili í eftirliti hjá lyklamiðstøð av, at undirskrivarin hevur hjá sær tær undirskriftardátur, ið hoyra saman við tær ásanningardáta, sum eru í próvnum.

Lyklamiðstøðin hevur endurgjaldsábyrgd um hon ikki kann prógva, at hon ikki hevur virkað av ósketni ella við vilja. Ein lyklamiðstøð ábyrgdast ikki fyri fíggjarligum missi, ið stendst av nýtslu av skikkaðum prógvi uttan fyri tær endamálsavmarkingar, ið eru galdandi fyri prógvið, ella fyri fíggjarligum missi, ið stendst av, at farið er út um upphæddaravmarkingarnar, ið eru galdandi fyri prógvið.

### Nýggja EU-forordningin

Í nýggju EU-forordningini nr. 910/2014, har eisini EU-direktiv 1999/93/EF verður sett úr gildi, verða endurgjaldsábyrgdarreglurnar ásettar í Kapillul II um Talgildan Samleika, Artikkul 11 og í Kappittul III um Álitistænastur, Artikkul 13.

Reglurnar eru fyri størsta partin um samskifti millum lond (grænseoverskridende transaktioner). Her verður ábyrgdarskyldan fyri tann miss, sum likamligir ella løgfrøðiligir persónar hava av at skyldirnar sambært forordningini ikki eru hildnar, løgd annaðhvørt á limalandið ella lyklamiðstøðina. Endurgjaldsábyrgdin er sambært reglunum hjá einstaka limalandinum.

Viðv. álitistænastum hevur tann, sum bjóðar út álitistænastur, ábyrgdina fyri endurgjald fyri miss, sum likamligir ella løgfrøðiligir persónar hava av at skyldirnar sambært forordningini ikki eru hildnar. Tann, sum sigur seg hava havt miss, skal prógva, at ein ikki-kvalifiseraður útbjóðari av álitistænastum hevur handlað við vilja ella av ósketni, fyri at sleppa undan endurgjaldsábyrgd. Ein kvalifiserður útbjóðari av álitistænastum skal sjálvur prógva, at hann ikki hevur handlað við vilja ella av ósketni, fyri at sleppa undan endurgjaldsábyrgd.

Um tann, sum bjóðar álitistænastur fram, hevur sagt sínum kundum frá um avmarkingar í sambandi við nýtslu av sínum tænastum, gerst hesin ikki ábyrgdaður fyri tap, sum stava frá nýtslu av álitistænastunum, sum eru víðari enn avmarkingarnar, sum kundin er kunnaður um.

Endurgjaldsábyrgdin er sambært lóggávuni í einstaka limalandinum.

## Onnur galdandi lóggáva

### Persónsupplýsingarlógin.

Ásett er í forordningini at viðgerð av persónsupplýsingar skal vera í samsvar EU direktiv 95/46/EF. Tað merkir t.d., at sannan (autentificering) í samband við eina online-tænastu einans skal vera av samleikadata, sum eru nøktandi, viðkomandi og skal ikki fevna um meira enn tað, sum er neyðugt fyri at geva loyva til at koma inn til viðkomandi tænastuna.

Ásett verður at útbjóðarir av álitistænastum og eftirlitsstovnar eiga at lúka treytirnar í direktivi 95/46/EF um konfidensialitet og viðgerðartrygd. Reglur um hetta eru hjá okkum ásettar í  kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at hesar reglur verða hildnar. Persónsupplýsingarlógin í Føroyum er gjørd í samsvar við EU direktiv 95/46/EF.

### Revsilógin.

Galdandi revsilóg er lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, som seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015.

Revsilógin var í 2010 broytt soleiðis, at tað í § 171, stk. 2 nú er ásett, at eitt elektroniskt skjal er javnsett við pappírsskjal í mun til skjalafalsan.

### Breksáttmálin.

Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

Tá ein skipan við talgildum samleika og undirskrift verður gjørd, eigur tað at verða tikið hædd fyri, at hesar skipanir eisini skulu kunna brúkast av persónum, sum bera brek ella á annan hátt hava serligar avbjóðingar.

## Fylgibroyting í aðrari lóggávu vegna formkrav í lóg ella kunngerð um skriftligheit

Verður talgild undirskrift og innsigli javnsett við hondskrivaða undirskrift mugu fleiri fylgibroytingar gerast á aðrari lóggávu, sum hevur krav um undirskrift og skrivligheit.

Í mun til formkrav um undirskrift er tað ymiskt, hví hetta er kravt í eini lóg.

Í nógvum førum er tað fyri at dokumentera, hvør tað er sum er undirskrivari. Í hesum førum er helst ongin trupulleiki at undirskriva elektroniskt, tí endamálið verður eins væl rokkið við elektroniskari undirskrift.

Í onkrum føri er krav um vitnisundirskrift sett inn fyri at tryggja enn betri, at tann sum undirskrivar er tann, sum hann gevur seg út fyri. I hesum førum er hugsandi, at lógin má tillagast, so at tað verður ásett, hvussu hetta kann gerast eins trygt elektroniskt.

Í nøkrum førum liggur meira enn bara undirskrift í einum slíkum formkravi. T.d við testamentum og líknandi skjølum er tað eitt krav, at vitni váttar við sín undirskrift, at undirskrivarin er tann, hann sigur seg vera, umframt at hesin er myndigur og skilur tað, sum hann undirskrivar. Eisini í hesum førum kann vera neyðugt at tillaga viðkomandi lóg, um tað sama skal kunnu lata seg gera elektroniskt.

Verður leitað í logir.fo uppá:

1) "skrivlig", so eru 146 fø. rættarreglur. Uml. 41 løgtingslógir og 105 kunngerðir.
2) "undirskrift", so erut 72 fø. rættarreglur. Uml. 26 lógir og 46 kunngerðir.
3) "skriftlig", so eru 249 danskar rættarreglur, tvs. love, anordninger, bekendtgørelser
4) "underskrift", so eru 83 danskar rættarreglur, tvs. love, anordninger, bekendtgørelser.
5) "elektronisk", so eru 171 rættarreglur (lógir, kunngerðir, fø. og dk)
6) "digital", so eru 26 rættarreglur

Tvs. 1-4 er íalt uml. 550 rættarreglur: 218 føroyskar og 332 danskar.

Tó eru 197 rættarreglur, har tað sær út sum at lóggevari hevur tikið støðu til ella tað er ein ábending um, at lóggevari hevur tikið støðu til elektroniskt ella digitalt samskifti.

## Lýsing av høvuðstættunum í viðkomandi lóggávu.

### Løgtingslóg nr. 74 frá 25. februar 2009 um elektroniska undirskrift.

Endamálið við hesi lógini er at fremja og tryggja virknað nýtslu av elektroniskum samskifti.

Sambært § 14 í hesi lógini verður ein framkomin elektronisk undirskrift javnsett við eina hondskrivaða undirskrift.

Krøv verða sett til ávísar elektroniskar undirskriftir og til lyklamiðstøðir (innlendskar og útlendskar), sum geva út prógv til elektroniskar undirskriftir til almenningin.

Útlendskar lyklamiðstøðir skulu annaðhvørt vera frá ES ella hava gjørt avtalu við ES og lúka krøvini í fyriskipan 1999/93/EF. Sínámillum avtala skal vera gjørt um hetta millum Føroyar og ES ella landið, har lyklamiðstøðin er etablerað.

Treytir verða ásettar fyri "Skikkað prógv" (qualified certificates) og til virksemið hjá eini lyklamiðstøð.

Endurgjaldsábyrgd hjá lyklamiðstøðum og um at lyklamiðstøðin hevur próvbyrðu um at hon ikki hevur virkað av ósketni ella við vilja í sambandi við fíggjarligan miss, um hon skal vera undantikið endurgjaldsábyrgd. Um í hvørjum førum lyklamiðstøðin ikki ábyrgdast.

Um innheintan av persónsupplýsing, sum bert skulu vera teir neyðugu fyri at útgeva ella varðveita prógv, og um samtykki frá skrásetta í sambandi við at innheinta og lata víðari persónsupplýsingar.

Um formkrøvini til elektroniska undirskrift (framkomna), sum skal vera gjørd av eini tryggari framleiðsluskipan.

Um krøv til mannagongdir og tøknuligar miðlar, sum skulu til, fyri at framleiðsluskipanin verður mett sum "trygg" og eftirkannan av hesum.

Fjarskiftiseftirlitið er eftirlitsmyndugleiki í Føroyum, og skal hava frágreiðing frá lyklamiðstøðini og kann áleggja lyklamiðstøðini at lata frágreiðingar v.m. og taka rættin frá lyklamiðstøð at nýta heitið "skikkað prógv".

Eisini verður greitt frá um treytir fyri at útlendsk skikkað prógv verða viðurkend í Føroyum.

Í løgtingslóg nr. 74 frá 25. februar 2009 um elektroniska undirskrift verður víst til fyriskipan 1999/93/EF um felagsskapsrammu fyri elektroniskar undirskriftir. Henda fer út gildi 1. juli 2016, tá nýggj fyriskipan "EU-forordning nr. 910/2014 af 23. juli 2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenester" kemur í gildi. Tí eigur at gerast ein nýggj løgtingslóg um elektroniskan samleika v.m.

### Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum

Galdandi persónsupplýsingarlóg er løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004.

Lógin hevur til endamáls at tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Persónsupplýsingar eiga at verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum, grundað á persónsupplýsingar við høgari góðsku.

Lógin er galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum fyri privat og fyri tað almenna, um viðgerðin er heilt ella lutvíst elektronisk, og um persónsupplýsingar eru ella verða settar í eina skrá, sjálvt um viðgerðin ikki er elektronisk.

Kjarnin í persónsverndini er sjálvsavgerðarrætturin. Tað merkir, at ein persónur sum høvuðsregla sjálvur eigur at gera av, hvat onnur skulu fáa at vita um hansara ella hennara persónligu viðurskifti.

Meginreglan fyri viðgerð av persónsupplýsingum er, at eina dátuábyrgdari skal ansa eftir, at persónsupplýsingarnar 1) eru loyvdar at viðgera, 2) bert verða savnaðar saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans, og at seinni viðgerð samsvarar hesum endamáli, 3) bert verða viðgjørdar, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkja endamálið við innsavnanini og tí víðari nýtsluni av upplýsingunum, 4) ikki verða nýttar til onnur endamál, sum ikki samsvara upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki, 5) verða varðveittar soleiðis, at ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini, og 6) eru beinar og verða nøktandi dagførdar. Nøktandi eftirlit skal tryggja, at persónsupplýsingar, sum eru rangar ella villandi, skjótast verða rættaðar ella strikaðar.

Í lógini eru krøv til viðgerð av persónsupplýsingum umframt serlig krøv til viðgerð av viðkvomum upplýsingum.

Reglur eru um nær almennir myndugleikar og privat kunnu brúka p-talið i teirra viðgerð.

Reglur eru um flutning av persónsupplýsingar til útlond. Eisini eru reglur um alment innlit, egið innlit og kunningarskyldu mótvegis skrásetta.

Krøv eru um at hava trygdarskipanir, hvørs endamál er at tryggja trúnað, sjálvræðisrætt og innlit eins og við tekniskum og fyriskipanarligum tiltøkum at tryggja, at persónsupplýsingar ikki av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar ella minka í virði, og at óviðkomandi ikki fáa kunnleika til persónsupplýsingar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær. Nærri reglur um hetta eru ásettar í kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Reglur eru um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, tá persónsupplýsingar verða elektroniskt viðgjørdar, og um viðgerðarloyvi við viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum.

Dátueftirlitið hevur eftirlit við allari viðgerð, sum er fevnd av persónsupplýsingarlógini.

## Lóg um fólkayvirlit

Endamálið við lógini er at tryggja, at 1) øll, ið eru fødd ella flutt til Føroyar, ella til viðgerð av skattamáli, hava eitt persónstal, 2) Landsfólkayvirlitið goymir grundleggjandi persónsupplýsingar um hvønn einstakan, ið hevur eitt persónstal, 3) hvør einstakur verður skrásettur á tí bústaði, har hann veruliga býr ella heldur til, og 4) upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum á hóskandi hátt kunnu latast almennum myndugleikum ella privatum, ið hava heimilaðan áhuga í hesum.

Persónstalið er føðingardagur, -mánaður og –ár, umframt eitt raðtal og eitt eftirlitstal. Raðtalið vísir í hvørjari øld, ein persónur er føddur.

Øll, ið hava eitt p-tal verða skrásett í FOLK við fylgjandi upplýsingum: persónstal, navn, bústað, føðiskráseting, dópsdag, ríkisborgararættur, kirkjustøða, ættarsamband (børn, foreldur), hjúnastøða og – dagfesting, starv og sjálvræði.

Reglur eru um skráseting av innlendis flytingum, flytingum til og úr Føroyum.

Í kap. 8 eru reglur um at lata upplýsingar víðari til almennar myndugleikar.

I kap. 10 eru reglur um hvørjar upplýsingar, sum kunnu latast víðari til privat.

Reglur um ávísa elektroniska viðgerð eru heimilað í § 9, stk. 3, § 33 og § 36. (§§ 33 og 36 ikki settar í gildi enn).

## Lóg um alment innlit

Endamálið við lógini er at geva almenninginum innlit í alt virksemið hjá almennu fyrsitingini undir heimastýrinum.

Ein og hvør kann við krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m. ávísum undantøkum.

Krav er um uppskrivingarskyldu, sum inniber at myndugleikin skal skriva upp innihaldið, tá myndugleiki munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum.

Í kap 3 eru ásetingar um fleiri undantøk frá reglunum um skjalinnlit.

Í § 5, stk. 2 og 3, og § 6, stk. 2 er “edv” nevnt.

## Fyrisitingarlóg

Endamálið við lógini at at áseta reglur um viðgerðina av málum, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð.

Ásett er nær ein persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, er ógegnigur at viðgera eitt mál. Eisini eru reglur um vegleiðing og umboðan.

Reglur eru um skjalinnlit partanna. Tað er at hann, sum er partur í einum máli, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, kann krevja at verða gjørdur kunnigur við skjølini í málinum.

Ásett er rættur til partshoyring. Hetta merkir at um ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, so kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar, og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli.

Ein partur hevur eisini rætt til at geva ummæli, áðrenn avgerð verður tikin

Kravt er at avgerð skal grundast, og at kæruvegleiðing skal gevast. Reglur eru um tagnarskyldu, og nær upplýsingar kunnu latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika.

Í føroysku lógini eru ongar reglur um elektroniskt samskifti.

Danska fyrisitingarlógin er broytt og heimilar elektroniskum samskifti við almennar myndugleikar. Sí § 32 a í donsku forvaltningslógini (LBK nr. 433 af 22/04/2014)

> **§ 32 a**. Vedkommende minister kan fastsætte regler om ret til at anvende digital kommunikation ved henvendelser til den offentlige forvaltning og om de nærmere vilkår herfor, herunder fravige formkrav i lovgivningen, der hindrer anvendelsen af digital kommunikation.

## Revsilógin

Galdandi revsilóg er lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, som seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015.

Í revsilógini eru almennu treytirnar fyri at revsing ásettar. Tað eru bert tey álvarsligu lógarbrotini, sum kunna hava við sær longri fongsulsrevsing, sum eiga at vera sett inn í revsilógina.

Reglurnar í revsilógini eru eisini galdandi fyri serlóggávu, har revsiramman vanliga ikki er hægri enn fongsul upp til 2 ár.

Í § 171, stk. 2 er elektroniskt skjal javnsett við pappírsskjal í mun til skjalafalsan.

> **§ 171**. Den, der gør brug af et falsk dokument til at skuffe i retsforhold, straffes for dokumentfalsk.
>
> Stk. 2. Ved et dokument forstås en skriftlig eller elektronisk med betegnelse af udstederen forsynet tilkendegivelse, der fremtræder som bestemt til at tjene som bevis.
>
> Stk. 3. Et dokument er falsk, når det ikke hidrører fra den angivne udsteder, eller der er givet det et indhold, som ikke hidrører fra denne.

## Breksáttmálin

Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við “Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap”.

## Nýggj løgtingslóg um elektroniskan samleika og álitistænastur o.a.

Ein kann siga at nýggja ES forordningin nr. 910/2014 er grundað á tað gamla direktivið 1999/93/ES, men forordningin hevur breiðari virkisøki og fevnir eisini um aðrar álitistænastur enn persónlig elektronisk undirskrift.

Ein nýggj løgtingslóg kann í stóran mun endurnýta ásetingar úr løgtingslógini um elektroniska undirskrift, við tað at tann lógin ásetir krøv til eina framkomnað undirskrift, sum samsvarar við høgt støði sambært forordningini.

Neyðugt verður at gera eina nýggja løgtingslóg, sum implementerar

1) EU-forordning nr. 910/2014 af 23. juli 2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenester,
2) Kommissionens gennemførelsesforordning (EU) 2015/1502 af 8. september 2015 om fastlæggelse af tekniske minimunsspecifikationer og procedurer for fastlæggelse af sikringsniveauer for elektroniske identikikationsmidler i henhold til artikel 8, stk. 3 i forordning nr. 910/2014,
3) Kommissionens gennemførelsesafgørelse (EU) 2015/296 af 24. februar 2015 om fastlæggelse af de proceduremæssige ordninger for samarbejde mellem medlemsstaterne om elektronisk identifikation i henhold til artikel 12, stk. 7 i EU forordning nr. 910/2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenester til brug for elektroniske transaktioner på det indre marked,
4) Kommissionens gennemførelsesforordning (EU) 2015/1501 af 8. september 2015 om interoperabilitetsrammen i henhold til artikel 12, stk. 8 i EU-forordning nr. 910/2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenester til brug for elektroniske transaktioner på det indre marked,
5) Kommissionens gennemførelsesafgørelse (EU) 2015/1505 af 8. september 2015 om fastlæggelse af tekniske specifikationer og formater for positivlister i henhold til artikel 22, stk. 5 i EU-forordning nr. 910/2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenester til brug for elektroniske transaktioner på det indre marked,
6) Kommissionens gennemførelsesafgørelse (EU) 2015/1506 af 8. september 2015 om fastlæggelse af specifikationer vedrørende formater for avancerede elektroniske signaturer og avancerede segl, som skal anerkendes af offentlige myndigheder i henhold til artikel 27, stk. 5, og artikel 37, stk. 5, i EU-forordning nr. 910/2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenetster til brug for elektroniske transaktioner på det indre marked, og
7) Kommissionens gennemførelsesforordning (EU) 2015/806 af 22. maj 2015 om specifikationer for udformningen af EU-tillidsmærket for kvalificerede tillidstjenester.

Í forordning nr. 910/2014 er herumframt heimilað, at Kommissiónin kann at áseta nærri reglur m.a. sambært

- artikul 9, nr. 5 um treytir, format og mannagongd fyri fráboðan,
- artikul 17, nr. 8 um format og manngongd tá eftirlitsmyndugleiki rapporterar til Kommissiónina,
- artikul 19, nr. 4 um trygdarátøk sum verða áløgd virkjum,
- artikul 20, nr. 4 um akkreditering og reglur um grannskoðan,
- artikul 21, nr. 4 um mannagongdir í samband við uppstarti av eini álitistænastu,
- artikul 24, nr. 5 um etablering av referansum til standardar fyri tryggar (“trustworthy”) skipanir og produktir,
- artikul 27, nr. 4 um referansur til standardar fyri avanseraðan esignatur, og
- artikul 28, nr. 6 um referansur til standardar fyri kvalifiseraði certifikatir

Endamálið við forordningini er at tryggja ein vælvirkandi innara marknað, og at hava eitt sambæriligt trygdarstøði fyri talgildan samleika og álitistænastur, sum kann styrkja álitið til elektroniskar flytingar og skipanir.

Ásetir nær eitt limaland skal góðkenna ein talgildan samleika fyri persónar og løgfrøðiligar persónar, sum eru fevndir av eini fráboðaðari eIDskipan í einum øðrum limalandi.

Trygdarstigini fyri talgildar samleikar eru trý: Lágt, munandi ella høgt.

Reglur eru um trygdarbrot, endurgjaldsábyrgd, samarbeiði og interoperabilitet í sambandi við eIDskipan, sum er fráboðað.

Reglur um álitistænastur, serstakliga um elektroniskar flytingar (transaktiónir).

Er ein rættarligur karmur fyri elektroniska undirskrift, elektroniskt innsigli, elektronisk tíðarstempul, elektronisk skjøl, elektroniskt skrásettar leveringstænastur og certificeringstænastur fyri sannan av vevsíðu (webside-autentifikatión).

Forordningin er galdandi fyri elektroniskar samleikaskipanir, sum eitt limaland hevur fráboðað til Kommissiónina. Hon er eisini galdandi fyri útbjóðaðar av álitistænastum, sum eru settar á stovn í EU.

Forordningin er ikki galdandi fyri álitistænastur, sum einans verða brúktar í eini afturlatnari skipan sambært nationalari lóggávu ella sambært sáttmála millum ein avmarkaðan skara av persónum. Tað eru bara álitistænastur, sum verða bodnar út alment og sum hava virknað mótvegis triðjamanni, sum eiga at lúka krøvini í forordningini.

Forordningin ávirkar ikki nationala ella EUrættsliga lóggávu um gerð og gildi av sáttmálum, ella aðrar rættsligar skyldur ella ásettar mannagongdir viðvíkjandi formkrøvum.

Ásett er at viðgerð av persónsupplýsingar skal vera í samsvar EU direktiv 95/46/EF. Tað merkir t.d., at sannan (autentificering) í samband við eina online-tænastu einans skal vera av samleikadata, sum eru nøktandi, viðkomandi og skal ikki fevna um meira enn tað, sum er neyðugt fyri at geva loyva til at koma inn til viðkomandi tænastuna.

Ásett verður at útbjóðarir av álitistænastum og eftirlitsstovnar eiga at lúka treytirnar í direktivi 95/46/EF um konfidensialitet og viðgerðartrygd. Reglur um hetta eru hjá okkum ásettar í kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at hesar reglur verða hildnar.

Í kap. II í forordningini eru reglur um talgildan samleika. Art. 6 – 12

Í kap. III er reglur um álitistænastur. Art. 13 - 45.

- Í art. 25 – 34 (partur 4) eru reglur um elektroniska undirskrift
- Í art. 35 – 40 (partur 5) eru reglur um elektroniskt innsigli
- Í art. 41 – 42 (partur 6) eru reglur um elektronisk tíðarstempul
- Í art. 43 – 44 (partur 7) eru reglur um elektroniskt skrásettar leveringstænastur
- Í art. 45 (partur 8) eru reglur um sannan av vevsíðu (webside-autentifikatión).

Í kap. IV eru reglur um elektronisk skjøl.

Forordningin hevur ikki revsiásetingar ella heimildir hjá eftirlitsmyndugleikanum. Hetta skal ásetast í løgtinglógini. sum implementerar forordning nr. 910/2014. Eisini skal ásetast hvør eftirlitsmyndugleikin er í Føroyum.

Í art. 14 er ásett at útbjóðarar av álitistænastum, sum eru heimahoyrandi í triðjalandi, kunnu góðkennast sum javnsett eftir avtalu, sum skal gerast millum EU og viðkomandi triðjaland. Føroyar eru at rokna sum triðjaland í mun til EU. Tað er tí neyðugt at gera avtalu við EU um at góðkenna álitistænastur hjá føroyskum útbjóðarum.

Nýggjar reglur mugu gerast, sum lýsa krøvini til ein talgildan samleika, tvs. hvør kann fáa ein talgildan samleika, málsviðgerð, rætt til upplýsingar, hvørjar upplýsingar og frá hvørjum myndugleika, treytir fyri at rætta og strika samleika o.tíl.

Eisini eigur at vera ásett, hvør myndugleiki ellar stovnur skal umsita skipanina, og hvør hevur eftirlit og er kærumyndugleiki

T.d. kunnu reglurnar í kap. 4 í løgtingslóg um elektroniska undirskrift, sum eru um krøv til eina lyklamiðstøð, í stóran mun endurnýtast í eini nýggjari løgtingslóg.

Sama er galdandi fyri kap. 5 um endurgjaldsábyrgd, kap. 6 um viðgerð av persónsupplýsingum, kap. 7 um elektroniska undirskrift og formkrøv, kap. 8 um trygga framleiðsluskipan fyri elektroniskar undirskriftir, kap. 9 um eftirlit og kap. 10 um viðurkenning av útlendskum prógvum og kap. 11 um revsing.

Eisini mugu ásetast reglur um aðrar álitistænastur sambært forordningini, so sum elektroniskt innsigli, elektroniskt tíðarstempul og elektroniskt skrásettar veitingartænastur

Innsigli er ein undirskifti hjá einum virki ella løgfrøðiligum persóni. Í eini løgtingslóg má tað ásetast, at eitt elektroniskt innsigli skal javnsetast við hondskrivaða undirskrift og skal kunnu nýtast sum prógv í einum rættarmáli.

Eisini skal í lógini vera ásett, at elektronisk skjøl, elektroniskt tíðarstempul og dátur, sum verða sendar ella móttiknar gjøgnum elektroniskt skrásettar veitingartænastur, ikki mugu noktast rættarvirkað ella viðurkenning sum prógv í einum rættarmáli, einans tí tey eri í elektroniskum skapi.

Í nýggju lógini eigur at vera heimild til landsstýrismannin at gera avtalu við ES, sum ásett í artikul 14 í ES forordningini.

Forordningin og onnur viðkomandi ES-skjøl eiga at vera viðløgd sum skjøl til lógina. Tað merkir, at um nýggjar ES reglur viðv. talgildum samleika og álitistænastur koma, so mugu nýggju ES reglurnar setast inn í lógina við eini broytingarlóg, tvs. samtykkjast av Løgtinginum. Tað kann vera umhugsa at geva landsstýrismanninum heimild at góðkenna og kunngera ES reglur, sum eru av meira tøkniligum slagi, ella reglur, sum vit vanliga vildu mett at vera reglur, sum eiga at vera ásettar í kunngerð.